***Helgi Abrahamsen***
***landsstýrismaður***

***Svar***

***upp á***

***fyrispurning frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, í løgtingsmáli nr. 95/2020 um útgjald til sjálvstøðugt vinnurekandi úr Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini***

**Spurningarnir vóru soljóðandi:**

1. *Hvørjar møguleikar hava sjálvstøðugt vinnurekandi og stjórar í egnari fyritøku at gerast fevnd av Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini?*
2. *Heldur landsstýrismaðurin, at kunningin viðvíkjandi tryggingarmøguleikum hjá sjálvstøðugt vinnurekandi er nóg góð?*
3. *Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakrar broytingar í mun til rættin hjá sjálvstøðugt vinnurekandi til at fáa útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini, til tess at tryggja, at eingin dettur niðurímillum?*

**Svar til spurning 1**
*Sjálvstøðug vinnurekandi*
Sjálvstøðug vinnurekandi kunnu tekna sær eina barsilspeningatrygging fyri 500 kr. um árið. Hendan upphædd verður eftir ætlan hækkað til 3.000 kr. í næstum. Treytirnar fyri at tekna sjálvbodnu tryggingina eru, at viðkomandi hevur bústað í Føroyum, hevur inntøku frá persónligum arbeiði sum sjálvstøðugur vinnurekandi her í landinum, annaðhvørt einsamallur ella saman við øðrum, og hevur tað sjálvstøðuga vinnuvirksemið sum høvuðsvinnu.

At vera sjálvstøðugur vinnurekandi merkir sambært kunngerðini ein persónur, sum rekur vinnu fyri egna rokning og ábyrgd og við tí endamáli at fáa fíggjarligan vinning. Barsilsskipanin metir nágreiniliga um, hvørt talan er um sjálvstøðuga vinnu. Sum meginregla er talan um sjálvstøðuga vinnu, tá ið tann vinnurekandi hevur fólk í starvi, hevur skattafrádrátt fyri rakstrarútreiðslur og avskrivingar av rakstrargøgnum sambært reglunum fyri sjálvstøðugt vinnurekandi, og verður skattaður av yvir-/undirskoti av virkinum, og er mvg-skrásettur, ella er íognari í íognarfelag.

Tryggingin skal hava verið í gildi samanhangandi í í minsta lagi í eitt ár, áðrenn hin sjálvstøðugi vinnurekandi hevur rætt til útgjald. Útgjaldið verður roknað eftir inntøkuni frá sjálvstøðuga vinnuvirkseminum fyri síðst lokna roknskaparár áðrenn fráveruna, og útgoldið verður fyri allar dagar, viðkomandi nýtir rættin at vera burtur frá arbeiði vegna barnsburð.

Treytirnar eru tær somu fyri at tekna sjálvbodna arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi. Tryggingin kostar 3.000 kr. um árið og skal somuleiðis hava verið í gildi samanhangandi í í minsta lagi í eitt ár, áðrenn hin sjálvstøðugi vinnurekandi hevur rætt til útgjald. Útgjaldið er 20.000 kr. um mánaðin fyrsta árið, og síðan 18.750 kr. um mánaðin.

Stýrið fyri ALS er í fer við at endurskoða kunngerðina um arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi.

*Stjórar í egnari fyritøku*
Stjórar fáa vanliga A-inntøku. Teir eru sostatt fevndir av barsilsskipanini og Arbeiðsloysisskipanini á jøvnum føti við løntakarar, ið fáa A-inntøku.

Er stjórin sjálvstøðugur vinnurekandi, hevur hann rætt til at teknað sær sjálvbodna barsils- og arbeiðsloysistrygging sum lýst omanfyri.

**Svar til spurning 2**
Á heimasíðuni hjá Barsilsskipanini, á undirsíðuni *Trygging,* stendur, hvat ið krevst, fyri at sjálvstøðug vinnurekandi kunnu fáa rætt til barsilspening. Á heimasíðuni hjá TAKS undir yvirskriftini *At stovna virki* stendur eisini ein teigur um Barsilsskipan, og at tað er neyðugt at tekna trygging fyri at fáa rætt til barsilspening. TAKS hevur upplýst, at TAKS kunnar øll, ið stovna einstaklingavirki ella íognarfelag, um, at tey sjálvi skulu tekna eina barsilspeningatrygging, um tey vilja verða fevnd av Barsilsskipanini.

Vísandi til hetta verður mett, at kunningin til sjálvstøðug vinnurekandi er á góðari leið. Kunningin verður givin í sambandi við, at sjálvstøðug vinnurekandi stovna sær virki, umframt at kunningin er á heimasíðunum hjá Barsilsskipanini og TAKS.

Á heimasíðuni hjá ALS er ein síða, nevnd *Sjálvstøðug vinnurekandi*, har upplýst verður um tryggingina til sjálvstøðug vinnurekandi. Hetta er einasta stað, ið kunnað verður um hesa trygging. Tað kann helst gerast betri.

Ætlanin er at gera eitt kunningarátak saman við Vinnuhúsinum, sum er ætlað sjálvstøðugum vinnurekandi, har tey á ein einfaldan hátt verða upplýst um sína rættarstøðu á ymiskum viðkomandi økjum, og har víst verður til røttu myndugleikarnar. Hugsanin er, at sama kunning er á fleiri heimasíðum, t.d. hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Vinnuhúsinum, TAKS, Vinnuframa, Íverksetarahúsinum og Hugskotinum. Harumframt er ætlanin at gera faldarar við sama innihaldi, sum skulu liggja har, ið tað kann hugsast, at sjálvstøðug vinnurekandi síggja teir.

**Svar til spurning 3**
Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur havt fund við TAKS um møguleikan at gera tað tvungið hjá sjálvstøðugum vinnurekandi at vera fevnd av Barsilsskipanini og ALS. Tekniskt er hetta møguligt, men einans um barsils- og ALS-gjald verða kravd av øllum B-inntøkum. Hetta hevur við sær, at barsils- og ALS-gjald skulu rindast av t.d. inntøku av húsaleigu, fríum ágóðum, nevndarsamsýningum o.ø. Nógvar av hesum inntøkum steðga ikki, meðan fólk eru í barsil ella eru arbeiðsleys. Sostatt hevði tað verið ein grundleggjandi broyting í skipanunum, sum jú eru

arbeiðsmarknaðarskipanir, sum endurrinda løntakarum fyri mista inntøku, meðan teir eru í barsilsfarloyvi, og stuðla meðan tey eru arbeiðsleys. Eisini verður tað trupult at fremja mótrokning fyri ta B-inntøkuna, sum persónar framvegis fáa, meðan teir eru í barsilsfarloyvi ella eru arbeiðsleys. Fyri summi hevði tað merkt eitt lægri útgjald enn eftir galdandi reglum.

Málið má kannast gjølla og viðgerast saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, áðrenn farið verður undir slíkar grundleggjandi broytingar.

**Helgi Abrahamsen**
landsstýrismaður